# GÓÐA MÁLING OG GÓÐA FYRIREIKING



Fyri at fáa tað besta úrslitið, tá tú málar, er neyðugt at kenna eitt sindur til mannagongdir og tilfar. Tá tú velur at mála við Dyrup-máling, er ein rúgva av ymsum vørum at velja ímillum, men samanumtikið kunnu vit siga, at tú skalt fylgja tveimum høvuðsreglum. Tú skalt fyrireika teg væl, og so gera av, hvat slag av máling tú vilt hava, tá vit hugsað um lit, styrki og glans.

Niðanfyri hava vit savnað nøkur góð ráð, soleiðis at tú kanst fáa besta úrslitið. Í Føroyum byggja vit ikki altíð á sama hátt, sum t.d. í Danmark, so tey ráð, sum ein finnur á eitt nú donskum heimasíðum, kunnu ikki altíð brúkast her heima.

## LOFTIÐ

Eitt nýtt loft skal vaskast og málast. Er talan um gips, skal alt dustið burtur. Síðani verður grundað við grundmáling og so málað. Minst til, at tess mattari loftið verður málað, minni síggjast ójavnheitirnar. Fert tú undir glans 20, so er ikki so lætt at vaska flatuna, uttan so at málingin eisini vaskast av. Nógv velja tó eina rættiliga matta loftmáling, og so verður málað aftur nøkur ár seinni, heldur enn at loftini verða vaskað. Tá tú vaskar loft, kann útslitið gerast, at tað fer at síggja ójavnt út, og so er neyðugt at mála undir øllum umstøðum.

Byrja við at mála úti við veggin við pensli. Síðani verða stóru flaturnar málaðar við rullu. Runna tann vegin, sum dagsljósið fellur inn í rúmið, um tað ber til. Lat tað ikki vera ov heit inni, tá tú málar, tí so bráðtornar. Mála altíð loftið áðrenn veggirnar, um tað ber til. So slepst undan, at loftmálingin dryppar á veggirnar og verður sitandi.

Litúrvælið hjá okkum er stórt. Vit hava allar ælabogans litir, og faklærd fólk, sum kunnu hjalpa tær. Harafturat hava vit møguleika at skanna ein serstakan lit inn í blandimaskinuna, soleiðis at tú fært akkurát tann litin, sum tú ynskir. Hevur tú eitt koppastell, ein bakka, ein dúk ella annað, hvørs lit tú vilt hava á veggin, so tekur tú lutin við tær, vit skanna litin á honum, og blanda málingina.

## VEGGIR

Undirlagið skal kunna taka ímóti málingini, so at skilja, at málingin skal hava góðar umstøður at hefta. Tað er tí neyðugt at vaska dustið av, umvæla hol og gamalt tapet o.l.

Fyri at fáa besta úrslitið, kanst tú vaska allan veggin við Dyrup Grundreinsievni, áðrenn tú málar. Tað stendur á dunkinum, hvussu tú skalt blanda.

Pussaðir veggir skulu málast við Dyrup Puds Grunder, áðrenn teir verða málaðir. Hetta er ikki neyðugt á gips (við pappíri) ella tapeti. Er talan um umvæling og tú hevur eitt stað, har tapetið ikki er málað, og aðrastaðir málað tapet, kanst tú blanda eina tunna blanding av endaligu málingini, og so mála ómálaða tapetið eina ella tvær ferðir, áðrenn allur veggurin verður málaður.
Eisini tá vit mála veggir, er tað galdandi, at tess hægri glans, tess betri síggjast ójavnheitir. So tað snýr seg um at hava eina so slætta flatu sum gjørligt, áðrenn tú fert í gongd. Men gev gætur, at máling við høgum glansi, er sterkari enn mattari máling.

## KØKUR OG BAÐIRÚM

Køkur, og kanska serliga baðirúm, krevja eitt sindur meira enn hini rúmini, tá vit skulu mála. Men tað ber væl til at fáa eitt gott úrslit. Dyrup hevur tí ment fleiri vørur, sum gera arbeiði lættari i køki og baðirúmi.

Nýggj rúm skulu vaskast fyri dust, grundast við Dyrup Grundreinsi og málast. Vit hava serstaka sterka máling til bæði vátrúm og køk (Dekstrem). Spyr í handlinum, so vegleiða starvfólk okkara.

Er talan um eitt rúm, sum hevur verið brúkt, er umráðandi, at allur skittur – feitt o.a. - verður vaskaður burtur, áðrenn tað verður málað. Vaska við Grundreinsi ella eini blanding av edikusýru og vatni (1:3). Minst til at vaska við reinum vatni, tá tú hevur vaskað við sýrblandingini.

Brúka Pudsgrundara, um talan er um pussaðar veggir. Eru brúnir blettir frá t.d. vatnskaða, kanst tú málað allan veggir við Dyrup Spærre Grunder, sum leggur seg uttan á blettirnar, so teir ikki síggjast ígjøgnum aftaná eina tíð.

Í baðirúmi viðmæla vit, at tú ikki brúkar ov matta máling. Spyr í handlinum, so vegleiða starvsfólk okkara, so tú fært tað bestu málingina til tað rúm, tú skalt mála.

## TÍN EGNI LITUR

Litúrvælið hjá okkum er stórt. Vit hava allar ælabogans litir, og faklærd fólk, sum kunnu hjalpa tær. Harafturat hava vit møguleika at skanna ein serstakan lit inn í blandimaskinuna, soleiðis at tú fært akkurát tann litin, sum tú ynskir. Hevur tú eitt koppastell, ein bakka, ein dúk ella annað, hvørs lit tú vilt hava á veggin, so tekur tú lutin við tær, vit skanna litin á honum, og blanda málingina.